

## Mona og Pauli til World Cup

Mona Simonsen og Pauli Øssurson Mohr, sum bæði eru fødd í 1991, sleppa umframt Pál Joensen, til World Cup kappingina í Berlin 14- og 15. novembur. Fyri at sleppa við til World Cup kapping krevst, at tú ert besti drongur ella besta genta yvir høvur. Tað vil siga, at tú skalt hava mest FINA stig, sum er ein útrokningarháttur í altjóða svimjing fyri at meta um støðið. Hetta megnaðu so Mona Simonsen á 400 metrar frí og fekk tí 731 FINA stig, sum ongin onnur kvinna megnaði, og Pauli Øssursson Mohr megnaði at vinna sær 686 FINA stig í 50 metrar frí. Bara Pál Joensen hevur megnað at fáa meira enn 686 FINA stig millum 1. septembur og 1. novembur.



# Hesi skulu við heiminum av

**World Cup í Berlin**
**14. - 15. nov. 2009**
Pál Joensen, SuSvim (1990)
Mona Simonsen, SuSvim (1991)
Pauli Ø. Mohr, FS (1991)

**Landdystur Føroyar-Ísland**
**24. nov. 2009**
Birita Debes, FLOT (1995)
Poula Ø. Mohr, FS (1995)
Mona Simonsen, SuSvim (1991)
Cecilia Eysturdal, Ægir (1996)
Shaila millum Garðarnar, SuSvim (1984)
Astrið Foldarskarð, FLOT (1994)
Tanja Skaalum, SuSvim (1997)
Turið S. Christiansen, Ægir (1996)
Kári á Høvdanum, Ægir (1990)
Pál Joensen, SuSvim (1990)
Jón Hofgaard, SuSvim (1992)
Pauli Ø. Mohr, FS (1991)
Bjarni M. Petersen, Ægir (1992)
Magnus Jákupsson, HS (1994)
Jóhann Heðinsson, FS (1995)
Andrass Thomsen, HS (1982)

**Norðurlendsk juniormeistarastevna í Bergen**
**5. - 6. des. 2009**
Poula Ø. Mohr, FS (1995)
Birita Debes, FLOT (1995)
Astrið Foldarskarð, FLOT (1994)
Monika Biskopstø, Ægir (1994)
Bjarni M. Petersen, Ægir (1992)
Evropeisk meistarastevna á stuttgeil 10. - 13. des. 2009
Shaila millum Garðarnar, SuSvim (1984)
Mona Simonsen, SuSvim (1991)
Pál Joensen, SuSvim (1990)
Pauli Ø. Mohr, FS (1991)
Kári J. á Høvdanum, Ægir (1990)

**Venjingarlega í Íslandi og Reykjavík International**
**8. - 17. jan. 2010 Bruttohópur NJM 2010 / EJM 2010**
Birita Debes, FLOT (1995)
Poula Ø. Mohr, FS (1995)
Helena Sævarsdóttir, SuSvim (1994)
Bjarni M. Petersen, Ægir (1992)
Monika Biskopstø, Ægir (1994)
Jón Hofgaard, SuSvim (1992)
Bruttohópur NUM 2010
Cecilia Eysturdal, Ægir (1996)
Magnus Jákupsson, HS (1994)
Turið S. Christiansen, Ægir (1996)
Jóhanna Egholm, FS (1996)
Sofus Bech, SuSvim (1994)
Tanja Skaalum, SuSvim (1997)
Jonna B. Thomsen, FS (1996)
Heðin L. Olsen, Ægir (1994)
Jóhann Heðinsson, FS (1995)
Guðrun Mortensen, SuSvim (1997)

*Kelda: svimjing.com*

### Geva sítt ítasta

Hóast sera nógvir svimjarar vóru í svimjihøllini í Klaksvík sunnumorgunin, so sást rættiliga væl, hvør hevði nakað upp á spæl í slavnu høllini, tí tey sóu út til at hugsa meitra enn hini.

Tað sást eisini á úrslitunum, at nógv var upp á spæl, tí sera nógvir svimjarar svumu sínar bestu tíðir nakrantíð, sjálvt um teir ikki megnaðu at verða úttiknir til ymisku kappingarnar.

Her kann leggjast afturat, at stemningurin í høllini ikki kann samanberast við eina veruliga kapping, so ongin svimjari varð pressaður av áskoðarunum til nakað úrslit. Tað var bara inni í høvdinum hjá sær sjálvum, at trýstið á svimjararnar lá, og tí kann roknast við, at flestu svimjararnir svimja skjótari, tá teir koma til veruligu kappingarnar.



### Sterk kapping

Vanliga eru tíðirnar hjá ymisku svimjarunum ikki so góðar hesa ársins tíð, men árið í ár er øðrvísi, hóast tað ikki er Oyggjaleikaár. Kappingin hevði nevniliga eitt so mikið høgt støði at fleiri svimjarar, sum megnaðu kravtíðirnar ikki sluppu við, tí aðrir svimjarar høvdu betri tíðir. Umframt, at tveir svimjarar kundi sloppið við til onkra kapping, um teir vóru eitt ár eldri, tí úrslitini vóru nóg góð til tað.

### Tey ungu væl fyri

Hjá teimum ungu var støðið øgiliga høgt. Summi svumu skjótastu tíð nakrantíð, meðan restin var upp í móti skjótastu tíðunum, hóast tað ikki er Oyggjaleikaár, sum annars er tað, sum vanliga er ein av gularótunum hjá føroyskari svimjing. Og tí kann staðfestast, at tíðirnar hjá teimum yngru eru óvanliga góðar.

### Ongin breidd hjá vaksnum

Hjá yngru svimjarunum eru í løtuni heilt nógvir svimjarar, men hjá teimum vaksnu eru næstan bara tey, sum svimja øgiliga skjótt. Har eru næstan ongir svimjarar, sum ikki megna at svimja kravtíðirnar til ymisku kappingarnar.

Ikki eitt einasta heiðursmerki varð handa í svimjihøllini í Klaksvík í kappingini, sum gekk fyri seg frá leygarmorgni til sunnukvøld, tí talan var »bert« ein úttøkukapping.

